# Bygningurin hjá Skretting í Hvalvík skift eigara

**P/F Skretting Føroyar hevur selt bygningin við keiina í Hvalvík til SP/F Sæborg. SP/F Sæborg fer at nýta ein fjórðing av bygninginum til goymslu. Tað írestandi verður leigað út.**
**– Við goymsluni hava vit møguleika at skipa okkara útgerð betri, sigur Tummas Justinussen, reiðari**

KEYP OG SØLA
*Heini S. Kritsiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

SP/F Sæborg hevur keypt høllina hjá P/F Skretting Føroyar, ið stendur á kaiøkinum í Hvalvík.

Bygningurin fer at verða nýttur sum goymsluhøll. Tummas Justinussen er reiðari í felagnum:

– 500 fermetrar av høllini, ið er 2000 fermetrar tilsamans, skulu nýtast sum goymsluhøli hjá skipum felagsins, og írestandi 1500 fermetrarnir verða útleigaðir.

– Skretting fara at leiga ein part til skrivstovuvirksemi, og brennistøðin fer eisini at leiga.

Skretting hevur eftir øllum at døma selt bygningin, tí at teir ikki longur hava tørv á so stórum goymsluplássi. Fóðurmarknaðurin er broyttur soleiðis, at tað verður blást beinleiðis á skipini, og tí er ikki eins stórur tørvur á goymslu.

Keypið er ein liður í at fáa skipað útgerðina hjá SP/F Sæborg betri.

– Tíðirnar eru soleiðis, at alt er vorðið meira ruddiligt. Onkur útgerð hjá okkum hevur verið goymd í Leirvík í sama bygningi sum skrivstovan, og okkurt hevur ligið uttanfyri. Eisini hava vit økt um virksemið, so tørvurin á einari goymslu er avgjørt til staðar.

– Nú hava vit koyrt sumt burtur, og tað, sum vit skulu nýta, goyma vit væl skipað í goymsluni, sigur Tummas.

Tað, at høllin liggur við eina kei, var avgerðandi fyri keypi.

– Vit hava leingi ynskt okkum eina goymslu, sum liggur við eina kei. Hon má liggja við eina kei, so at skipini sleppa framat at av- og áskipa teirra útgerð.



*Bygningurin sum Sp/f Sæborg hevur keypt, er tann sum á myndin liggur nærri sjónum. – Vit hava leingi ynskt okkum eina goymslu, sum liggur við eina kei. Hon má liggja við eina kei, so at skipini sleppa framat at av- og áskipa teirra útgerð, sigur Tummas Justinussen, reiðari*

*Mynd: Rólant W. Dam*

Goymslan í Hvalvík er sera væl egnað til hetta endamálið, sigur Tummas Justinussen at enda.

# Lestrarkunning fyri pisur í Miðlahúsinum

**Meginfelag Føroyska Studenta og Altjóða Skrivstovan skipar aftur í ár fyri einum kunnandi fundi fyri teimum, sum fara uttanlands at lesa. Pisudagurin verður sunnudagin 6.august kl. 17.00 í Miðlahúsinum**

PISUDAGUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Aftur í ár fara Meginfelag Føroyska Studenta (MFS) og Altjóða Skrivstovan (ASK) saman við Føroya Sparikassa at bjóða øllum teimum, ið hava fingið játtandi svar frá útbúgvingarstovnum uttanlands til kunnandi fund sunnudagin 6.august kl.17.00 í Miðlahúsinum.

**Á skránni verða:**

- Luttakararunda- hvør ert tú, hvar og hvat skalt tú lesa.
- MFS sum áhugafelagsskapur
- At gerast lesandi – tað ókenda
- At vera lesandi – lívið sum lesandi
- SU- viðurskiftið
- Onnur praktisk viðurskifti
- Lesandi og búskapur (Føroya Sparikassi)
- ASK – lestur uttan fyri Danmark
- Bólkauppdeiling- lesandi frá ymiskum býum í Danmark, Onglandi og Skotlandi svara spurningum.

**Fáa eina lættari lestrarbyrjan**

MFS er ein studentapolitiskur felagskapur, sum arbeiðir fyri teimum lesandi. MFS skipar millum annað fyri sosialum tiltøkum. Meginparturin av orkuni verður tó nýttur til kunning um lestrarmøguleikar og lestrarstøð. Alt arbeiðið verður gjørt ólønt. MFS fær 200.000 krónur av fíggjarlógini árliga.

Doris Bjarkhamar er forkvinna í MFS. Hon leggur dent á, at tiltakið sunnudagin er fyri at tey, sum fara uttanlands at lesa, kunnu fáa eina førning við sær og sostatt eina lættari lestrarbyrjan.

– Hetta er eitt afturvendandi tiltak, sum altíð er fyrsta sunnadag í august. Undirtøkan hevur verið góð, men í fjør lá tiltakið eitt sindur óheppið, tí at tað var tann besti summardagurin á árinum, og eg haldi eisini at HB og B36 spældu tá.

– Vit vóna at nógv møta upp, tí at vit vilja fegin hjálpa teimum, sum fara uttanlanda at lesa. Vit kunnu svara spurningum um ymisk ivamál.

– Vit halda, at vit hava eina spennandi skrá í ár við onkrum øðrvísi eisini. Vit hava ofta fingið spurningar um fíggjarligu viðurskiftini hjá teimum lesandi, og í ár fáa vit fólk frá Føroya Sparikassa, sum koma at geva eina meting um, hvussu tað er skilabest at leggja búskapin sum lesandi.

– Tiltakið er eisini ein góður møguleiki at møta øðrum, sum fara at lesa. Luttakararnir fáa eisini møguleika at tosa við fólk, sum eru komin miðskeiðis í teirra lesnaði, og tað skuldi heilt vist verið gott at fingið eina 1. persóns-frágreiðing um lívið sum lesandi, sigur Doris.

**Mentanarligar forðingar**

Altjóða Skrivstovan er undir mentamálaráðnum. Í Fíggjarlógini stendur soleiðis um Altjóða Skrivstovuna:

"Altjóða Skrivstovan varð sett á stovn í 2000 og er endamálið hjá skrivstovuni at vera savningarstað fyri vitan um útbúgvingar-, granskingar- og stuðulsmøguleikar uttan fyri Føroyar. Herumframt er skrivstovan sambindingarlið millum lesandi og lærustovnar úti og heima og er savningarstað fyri vitan um útbúgving og gransking, sum hevur áhuga fyri føroyingar og Føroyar. Skrivstovan hevur ítøkiligar uppgávur í sambandi við lestrarvegleiðing og – ráðgeving, umseting av millumlanda avtalum og skipanum, umframt samskipan av samstarvi við útlendskar lærustovnar."

Holger Arnbjerg er leiðari ASK. Hann metir, at pisudagurin hevur stóran týdning.

– Vit arbeiða fyri at økja um talið av lesandi uttanlands - eisini í øðrum londum enn Danmark. Ofta eru forðingarnar fyri at fara enn longur enn til Danmarkar at lesa meira praktiskar og mentanarligar enn tær eru búskaparligar.

– Vit skipaðu millum annað fyri tiltakinum „markleys útbúgving" í fjør, sum var lestrarkunning um lestrarmøguleikar kring heimin. Arbeiðið gevur ávøkstur, og talið av lesandi uttanlands er vaksandi, sigur ágrýtni leiðarin á ASK.

Fyriskipararnir vóna, at fólk taka av tilboðnum og møta upp í Miðlahúsinum klokkan 17 sunnudagin.